# Renning á Vestanstevnu

RENNING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 12. juli verður skipað fyri rennikapping á Vestanstevnu í Sandavági. Kappast verður í ymsum bólkum bæði hjá vaksnum og børnum.

Øll eru vælkomin at luttaka í kappingunum, ið bæði eru einstakar kappingar og partur av Grand Prix kappingini í renning, sum Frælsur Ítróttur Føroya skipar fyri.

Øll kappingin fer fram nærhendis kirkjuni í Sandavági. Tveir teir yngru aldursbólkarnir hjá børnum renna eina rundu á eystara áarbakka, meðan tveir teir størru renna tvær. Tey vaksnu renna góðar 5 rundir í bygdini.

Kappingin byrjar kl. 12.00, tá vaksin renna 5 km.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, fevnir kappingin um tveir aldursbólkar: vaksin (menn og kvinnur f. 1958-1985), og veteranar (menn og kvinnur f. -1957). Vinnararnir fáa steyp, og nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki.

Børnini byrja kl. 12.30, tá dreingir -7 og gentur -7 (f.1996 ella seinni) renna 500 m. Síðani renna dreingir -10 og gentur -10 (f.1993-1995) sama tein.

Tveir teir eldru bólkarnir hjá børnum, dreingir -13 og gentur -13 (f. 1990-1992) og dreingir -17 og gentur -17 (f. 1986-1989), renna 1 km.

Nummar 1, 2 og 3 í øllum bólkum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Tey, ið ætla sær at luttaka, skulu melda til á heimasíðuni hjá Frælsum Ítrótti Føroya www.athletics.fo innan fríggjakvøldið 11. juli kl. 18.00. Tað ber tó eisini til at melda til á p-plássinum við kirkjuna, hálvan tíma áðrenn kappingin byrjar.


Leygardagin 12. juli verður skipað rennikapping á Vestanstevnu í Sandavági fyri fólk í øllum aldri

### Kappast verður eftir hesi skrá:

**11.30** Tilmelding á p-plássinum við kirkjuna í Sandavági
**12.00** Vaksin (f. 1958-1985) og veteranar (f. -1957) renna 5 km
**12.30** Dreingir -7/Gentur -7 (f.1996 ella seinni) renna 500m
**12.40** Dreingir -10/Gentur -10 (f.1993-1995) renna 500m
**12.50** Dreingir -13/Gentur -13 (f.1990-1992) renna 1.000m
**13.00** Dreingir -17/Gentur -17 (f.1986-1989) renna 1.000m
**13.10** Heiðursmerkjahandan á p-plássinum við kirkjuna.

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Heðin á Lakjuni | B36 | 7 |
| John Petersen | B36 | 6 |
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 4 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Jákup á Borg | B36 | 3 |
| Dánjal Hansen | B68 | 3 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Clayton Soares | FSV | 3 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 3 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 3 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 3 |
| Milan Kulic | VB | 3 |
| Jens Kristian Hansen | B36 | 2 |
| Sjálvmál | B68 | 2 |
| Egil á Bø | EB/S | 2 |
| Gert Hansen | EB/S | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 2 |
| Sorin Anghel | EB/S | 2 |
| Elfinn Ørvarodd | FSV | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 2 |
| Kim Poulsen | FSV | 2 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 2 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 2 |
| Atli Danielsen | KÍ | 2 |
| Ove Nysted | KÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Bogi Gregersen | Skála | 2 |
| Allan Mørkøre | B36 | 1 |
| Bárður Mortansson | B36 | 1 |
| Klæmint Matras | B36 | 1 |
| Sjálvmál | B36 | 1 |
| Sonni Johansen | B36 | 1 |
| Fróði Benjaminsen | B68 | 1 |
| Jóan Petur Poulsen | B68 | 1 |
| John Heri Dam | B68 | 1 |
| Sjálvmál | EB/S | 1 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 1 |
| Marek Viersbicki | EB/S | 1 |
| Silva | FSV | 1 |
| Hans Pauli Petersen | GÍ | 1 |
| Bjarni Jørgensen | HB | 1 |
| Hallur Danielsen | HB | 1 |
| Símun Eliasen | HB | 1 |
| Allan Joensen | KÍ | 1 |
| Símin Joensen | KÍ | 1 |
| Brynjólvur Nielsen | NSÍ | 1 |
| Messias Perreira | NSÍ | 1 |
| Óli Hansen | NSÍ | 1 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 1 |
| Palli Augustinussen | VB | 1 |
| Arnhold Berg | Skála | 1 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 1 |
| Pauli G. Hansen | Skála | 1 |

# Úttøkuvenjing til U-19 kvinnulandsliðið

LANDSLIÐ
*Stefan í Skorini*

Álvur Hansen, landsliðsvenjari hjá U-19 kvinnulandsliðnum, hevur sent boð eftir tríati leikarum at koma til úttøkuvenjing. Venjingarnar eru í dag, fríggjadagin, og týsdagin.

Landsliðið skal í døgunum 23. til 30 september í ár luttaka í EM-undankapping í Bosna-Herzegovina, og hetta er ein liður í úttøkuni av tí endaliga hópinum.

Tær, sum hava fingið boð, eru: Jóhanna Ólavsdóttir og Maria við Neyst úr KÍ. Ása Christiansen, Unn Kragesteen, Selma Dahl Erol, Ása Dam á Neystabø, Heidi Hansen, Elsa Maria Olsen og Lív Horsdal úr B36. Mary-Ann Isaksen og Maibritt Svalbard úr B68. Maria Michelsen, Asta Magnussen, Elin Kathrina Haraldsen og Jytta Drangstein úr AB. Randi S. Wardum, Kristina D. Simonsen, Malan á Dunga, Linda Weihe og Ása úr Dímun úr HB. Birgit Kaliqay, Annika Niclasen og Jóna Hansen úr FS Vágum. Anja Klæmintsdóttir og Henny Olsen úr GÍ. Dania Berthelsen úr Skála. Birita Christiansen og Doris Joensen úr EB. Hanna Poulsen og Irdi Toftegaard úr ÍF.

### Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 23 | 8 | 15 | 22 |
| 2 HB | 10 | 6 | - | 3 | - | 1 | 25 | 13 | 12 | 21 |
| 3 NSÍ | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 20 | 9 | 11 | 19 |
| 4 B68 | 10 | 4 | - | 5 | - | 1 | 12 | 7 | 5 | 17 |
| 5 KÍ | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 11 | 15 | -4 | 17 |
| 6 EB/Streymur | 10 | 3 | - | 4 | - | 3 | 16 | 18 | -2 | 13 |
| 7 GÍ | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 12 | 15 | -3 | 12 |
| 8 FS Vágar | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 12 | 23 | -11 | 7 |
| 9 VB | 10 | 1 | - | 3 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 6 |
| 10 Skála | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 6 | 19 | -13 | 3 |



# Ternan og Dúgvan um Leirvíksfjørð


*Um tað uppskotið, sum nú liggur á arbeiðsborðinum hjá Strandferðsluni, verður veruleiki, so verða tað Dúgvan og Ternan, sum fara at røkja siglingina um Leirvíksfjørð*

**Seinastu tíðina hava nógvar søgur gingið runt í Klaksvík um, at Ternan fer at verða sett inn í sigling saman við Dúgvuni um Leirvíksfjørð. Kristian Davidsen, strandferðslustjóri, váttar, at tað verður arbeitt við hesum, men enn er onki ítøkiligt komið burturúr**

STRANDFERÐSLAN
*Solby A. Eliasen*

Leirvíksfjarðarleiðin hevur verið nógv uppi og vent seinasta árið ella so. Dúgvan megnar ikki at røkja siglingina um Leirvíksfjørð einsamøll, og mangan valdar kaos á ferjuleguni í Klaksvík serliga, tá longu bilarøðirnar koma langt niðan á Stangavegin og eru til miklan ampa fyri vanligu ferðsluna. Og somuleiðis er bíðitíðin til at sleppa yvir um fjørðin long, og tað tarnar serliga vinnulívinum.

Sam varð settur inn at røkja siglingina saman við Dúgvuni, men fyri eini tíð síðani varð Sam tikin úr aftur siglingini, tí hann vísti seg at vera í so ringum standi, at hann ikki kundi sigla meira. Hann liggur í dag á Klaksvíkar Sleipistøð, har neyðugu ábøturnar verða gjørdar á hann.

– Sam vísti seg at vera verri fyri, enn vit høvdu væntað, so nógvar ábøtur skuldu gerast á hann fyri, at hann yvirhøvur skuldi kunna sigla. Pappírini vórðu jú tikin frá honum, so tað var alneyðugt at gera hann í stand, greiðir Kristian Davidsen frá.

Stjórin á Strandferðsluni væntar, at Sam verður liðugur mánadagin, og so verður hann settur aftur í sigling um Leirvíksfjørð. Men harvið er trupulleikin um Leirvíksfjørð ikki loystur, og stjórin á Strandferðsluni ásannar, at Sam megnar ikki at nøkta tørvin við verandi modelli.

– Trupulleikin við Sam er, at tað er bert tann eina manningin, og verður hann so settur inn at byrja at sigla tíðliga um morgunin, so nøktar hann ikki trýstið, sum vanliga er seinni um dagin, og umvent, um vit seta hann at byrja siglingina seinni á degnum, greiðir Kristian Davidsen frá.

Tí er Strandferðslan saman við Leirvíksfjarðarbólkinum, sum varð settur í februar, farin at arbeiða við einum uppskoti um, at Ternan ístaðin verður sett inn at røkja siglingina um Leirvíksfjørð saman við Dúgvuni. Hetta er eitt ynski, sum hevur verið í Norðoyggjum í langa tíð, og nú liggur eitt møguligt uppskot also á arbeiðsborðinum.

Men Kristian Davidsen leggur dent á, at uppskotið bert liggur á borðinum.

– Vit arbeiða við tí, tað kann eg vátta, men í skrivandi stund er tað bert á borðinum. Vit eru als ikki liðug við tað, og tað er heldur ikki góðtikið nakrastaðni, sigur hann.

Hann viðgongur, at tað serliga er tað peningaliga, sum spælir inn, tí henda loysnin kann ikki sigast at fara at verða ein av teimum bíligastu. Og fíggjarliga illveðrið, sum Strandferðslan er og hevur verið í hetta árið, ger tað ikki lættari at fáa hetta at bera til.

– Vit arbeiða við ymsum uppskotum um, hvussu hetta kundi verðið gjørt, og hvussu bíligt vit kunnu gera tað, men sum sagt so er onki ítøkiligt at siga frá enn, sigur Kristian Davidsen, sum er nakað varin við at úttala seg um hetta. Men samstundis ásannar hann, at tørvurin av flutningi um Leirvíksfjørð er so mikið stórur, at tað má ein loysn til.

– Vit hava lagt nógva orku í arbeiðið við at finna eina loysn, sigur Kristian Davidsen, sum kallar hetta uppskotið fyri eina menningarverkætlan um Leirvíksfjørð.

Stjórin á Strandferðsluni veit ikki at siga fyri vissu, nær talanin verður um eitt ítøkiligt uppskot.

– Uppskotið liggur sum sagt á arbeiðsborðinum enn, og enn skal nógv ymiskt fáast upp á pláss. Men manningin er kunnað um tað, og vit arbeiða í tøttum samstarvi við Leirvíksfjarðarbólkin, sum jú varð settur til sama endamál, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni at enda.


**3 starvsfólk**
til Mylnuna

**Bilførari**
Frítíðaravloysari søkist frá viku 29 til viku 31 til útkoyring av bakaravørum. Ikki er neyðugt við tí stóra koyrikortinum.

**Vaskifólk**
søkist til at vaska bakaríið eftir kl. 15.00.
Starvið skal setast skjótast til ber.

**Pakkifólk**
Frítíðaravloysari søkist frá viku 31 til viku 36.

Áhugað til starvíní kunnu ringja til Eirik Magnussen á telefon 314456 ella 214456.

mylnan